FÓLKATINGSVALIÐ 2001

# Virðing er ikki nakað man biður um - tað er nakað man hevur uppiborið!

**Thomar Arabo**
*fólkatingsvalevni Javnaðarflokkdins*



Vit mugu ikki gera sum Tjóðveldisflokkurin ætlar, og biða og bøna danska Fólkatingið um virðing og viðurkenning. Tað er nakað vit hava uppiborið, og so er ikki meira at siga um tað.

Sambandið og Tjóðveldið vilja báðir forða fyri einari loysn í sjálvstýrisspuringinum. Tjóðveldisflokkurin sigur, at einki uttan fullveldi ber til, og Sambandsflokkurin sigur alt uttan teir verða loysingarfólk.

Fullveldisætlan landsstýrisins er dottin niðurfyri, og at fara niður á Fólkating í avmakt og royna at fáa teir at hjálpa í nøkrum sum man ikki klárar at finna semju um í Føroyum er stór skomm.

Vit skulu halda høvdið høgt og mennast á sjálvstýrisleið við einari hóvligari loysn, ið ein breiður meiriluti av fólkinum tekur undir við. Ein fólkatingssessur má ikki blíva eitt stað, har grenj og undirbrotligheit ræður sosum nýggja ættarliðið í Tjóðveldisflokkinum ætlar.

Allir føroyingar vita hvønn veg man skal - vit skulu økja um sjálvstýri. Tað er bara Tjóðveldismenn, ið vilja longur enn flest onnur á loysingarleiðini, men tað burdi ikki forðað fyri, at teir kundu komið til eina semju við Javnaðarflokkin ið fekk teir nakað áleiðis, heldur enn støðuna sum nú er íkomin, har vit ongan veg koma.

Ivast tú ikki í, at Føroyar eru ein tjóð, so vel Javnaðarflokkin. Tjóðveldisflokkurin má ivast í hesum - hví annars spyrja danska Fólkatingið eftir?

# Fólkatingsvalið 20. november 2001

**Eyðun Elttør**
*Fólkatingsvalevni Sjálvstýrisfloksins*



Fyrstu veljarakanningarnar í sambandi við fólkatingsvalið komandi geva greiðar ábendingar um at sterka polariseringin millum fullveldi og samband heldur fram. Og í slíkari polarisering er torført hjá einum hóvligum Sjálvstýrisflokki at standa seg.

Tað er tó ikki bara í Føroyum at miðflokkarnir eru kroystir. Við Berlinmúrinum doyði vanliga hugsjónarliga stríðið millum høgra og vinstra í Europa. Europeiski veljarin leggur dent á vælferð og skilagóðar praktiskar loysnir heldur enn hugsjónarligar parolur.

Stutt sagt: veljarafjøldin er har, sum miðflokkarnir altíð hava verið.

Trupulleikin er bara, at flokkar bæði á vinstra- og høgravonginum - eisini føroyskir flokkar - nú siga seg liggja á miðjuni. Lat meg tí ávara veljaran móti at halda, at flokkar skifta ham eftir stuttari tíð. Veruligan, hóvligan miðpolitikk fáa tit bara við at velja ein flokk, sum altíð hevur sæð tað sum sína uppgávu:

- at byggja brýr,
- at mýkja fastlæstur støður, og
- at finna hóvligar loysnir, sum tæna føroyska fólkinum.

Søguliga hevur hetta verið uppgávan hjá Sjálvstýrisflokkinum og hetta er eisini uppgávan í verandi samgongu. Tí legði Sjálvstýrisflokkurin rygg til at fáa sjálvstýristilgongdina aftur á kós eftir at fullveldisleiðin rendi seg fasta.

Í verandi samgongu umsitur Sjálvstýrisflokkurin almanna- og heilsumál umframt olju- og umhvørvismál. Eg skal stutt siga eitt sindur um olju- og umhvørvismálini:

Karmarnir um eina føroyska oljuvinnu, bæði hvat lógum og umsiting viðvíkir, eru fingnir uppá pláss; fyrsta útbjóðingarumfar er avgreitt og oljuleitingin er byrjað. Fyrstu úrslitini hava ikki víst stórar nøgdir av olju, men prógva hinvegin, at olja og gass verða tilevnað í føroysku undirgrundini. Úrslitini frá eini boring til aðra gera, at framstig allatíðina verða gjørd og góðar vónir eru um, at vit einaferð loysa gátuna um, hvussu kolvetni flyta seg í undirgrundini og tá finna nøgdir, ið tað loysir seg at framleiða.

Til ta tíð kunnu vit fegnast um, at føroyingar og føroyskar fyritøkur longu hava prógvað, at hetta er ein vinna, har vit kunnu vera við. Eitt aðalmál í sambandi við førda oljupolitikkin hevur verið, at kappingarførið heima skal vinna okkum marknaðir í okkara grannalondum. - Tað er tí við gleði, at eg havi kunnað staðfest, at einstakar føroyskar fyritøkur longu eru í ferð við at gerast partar av oljuvinnu uttanlands.

Á umhvørvisøkinum verður grundarlag lagt fyri einum meira heilskaptum umhvørvispolitikki komandi árini. Við støði í eini frágreiðing um náttúru- og umhvørvisviðurskifti fer løgtingið um stutta tíð at hava aðalorðaskifti um umhvørvismál, og vónandi er hetta byrjanin til eina hægri raðfesting av umhvørvismálum. Havi í hesum sambandi eisini hug at nevna, at arbeitt verður við at yvirtaka havumhvørvismálini og vónandi kann hetta avgreiðast um stutta tíð, hóast fólkatingsvalið møguliga seinkar yvirtøkugongdini. - Eg havi lagt dent á, at yvirtøkan av havumhvørvismálunum verður framd í góðum samstarvi við danskar myndugleikar, tí nútíðar umhvørvispolitikkur er tætt knýttur at altjóða viðurskiftum, har vit í verandi ríkisrættarligu støðu verða umboðað av donskum myndugleikum. Eingin ivi er kortini um, at vit eisini í altjóða høpi sjálvi eiga at verja okkara egnu umhvørvisáhugamál.

Síðani vit fingu heimastýri fyri meira enn fimti árum síðani, eru fáar samgongur skipaðar uttan at Sjálvstýrisflokkurin hevur verið við. Nú sigur ein samfelagsfrøðingur at brúk er ikki fyri Sjálvstýrisflokkinum longur.

Einki kann vera skeivari: uttan Sjálvstýrisflokkin endar alt politiskt stríð í Føroyum í reinum blokkpolitikki, har sjálvstýrismálið gerst eitt svarthvítt stríð millum samband og fullveldi og búskaparligi politikkurin gerst ein hugsjónarlig oyðimarkargongd millum høgra- og vinstraloysnir.

Fólkatingsvalið verður mett at geva eina ábending um løgtingsvalið komandi. Tí er ógvuliga umráðandi, at øll sjálvstýrisfólk leggja innanhýsis ósemjur afturum og fara á val 20. november fyri í verki at vísa, at føroyskur politikkur hevur brúk fyri einum veruligum miðflokki - hevur brúk fyri flokkinum, sum altíð leggur rygg til tær hóvligu, praktisku loysnirnar. Loysnirnar, ið tæna føroyingum best.

Veljið Sjálvstýrisflokkin.

# Tíðin er komin

**Turið Sigurðardóttir**
*valevni Tjóðveldisfloksins*



Tjóðveldisflokkurin vil á fólkatingi eins og heima í Føroyum stríðast fyri staðfesting av føroyskum tjóðarrættindum. Hetta skal tryggja okkara heimarætt og okkara virkisrætt millum heimsins tjóðir. Ikki allir flokkar leggja dent á hetta, Javnaðar- og Sambandsflokkurin siga tað ongan týdning hava, tí, siga teir, vit vita okkara millum at vit eru ein tjóð, tað er óneyðugt at siga tað hart, hóast hanin gelur. Ja, góðu javnaðar- og sambandsfólk, tað fløvar, at tit í hjartanum viðurkenna at vera føroysk tjóð. Tað er bara ikki nóg mikið í nútíðarligu heimskringini at vera samd um hetta innantanna. Til fullan myndugleika í samskiftum við onnur lond krevst formligur, skjalfestur, altjóða viðurkendur rættur. Og tann rætturin er enn ikki í okkara egnu hondum, hann er í øðrum hondum nevniliga donskum, og harvið eru vit heft. Hetta darvar okkum í politisku, mentanarligu og vinnuligu menningini.

Tjóðskaparrørslan kom til Føroyar úr Danmark og festi djúpar røtur her. Hon hevur stríðst fyri føroyskari mentan, sjálvbjargni og sjálvsvirðing í 100 ár og tað ger hon enn. Í 1910, tá ið hart leikaði á móti tí føroyska undir sambandsmeirilutanum, segði Símun av Skarði í "Hugsan mín á tingi":

Blindaða fólk, sum livir í
trúgv,
at hetta valdið skal reisa títt
búgv!
Tú sært ei ta stóru
sálarneyð,
at líðandi glíður tú mót
tínun deyð',
at dýrasta ogn tín traðkast í
skarn,
at heimleyst verður títt
egna barn.

Alla farnu øld helt stríðið fyri heimarættinum fram. Í 1984 skrivaði Erlendur Patursson:

Vit mugu venda okkum ímóti, at land okkara er gjørt til "område", og ímóti, at tjóð okkar er gjørd til útlendingar, sum búgva í hesum "område".

Enn eru vit "område" so skjótt, sum talan er um uttanlandsviðurskifti, og tað er tað alla tíðina í dag. Tjóðveldisflokkurin gongur á odda í tí grundleggjandi stríðnum fyri at broyta hetta, og tíðin er við okkum. Tíðin kallar á Føroya fólk, eins og summarmorgunin kallar fram fuglasang og døgg. Aðrir føroyskir flokkar merkja tað eisini og teir flyta seg. Tjóðveldisflokkurin hevur gjøgnum tíðina lagt lunnar undir stórmál, sum hinir flokkarnir síðani hava fylkt seg um og tikið undir við - sjómarkið, undirgrundin - og nú er búningartíðin komin hjá tí størsta málinum - fullveldismálinum. Vit koma ikki longri í búning sum tjóð undir donskum yvirræði. Vilja vit ikki træna, standa í stað og fara aftur sum tjóð - hóast kanska rík við pengar -, so er at taka fullan myndugleika yvir okkum sjálvum og okkara ognum. Tíðin er búgvin til ein fulltiknan føroyskan politikk og avbjóðingarnar hann setur. Tá kunnu vit fáa ein javnaðarpolitikk, ið er annað enn at javna ójavnar við donskum pengum, ein borgaraligan politikk, sum ikki leggur ein part av ábyrgdini uttanlands.

Simulator-skeiðið er liðugt! Tíðin er komin, til at føroyingar taka við landi sínum.



FÓLKATINGSVALIÐ 2001

# Hví slíkt rumbul???

**Johan Dahl**
*Valevni Sambandsfloksins*



Hvat er galið við okkum føroyingum - ella er nakað galið?

Hvat í allari víðu verð skal øll henda øsingin um fullveldi, evsta rætt, og hvat tað annars alt eitur til?

Í mínari verð - hon er kanska ikki so sofistikerað, sum hjá teim útvaldu - kann tað einans enda við, at vit gera eina annars sera vælvirkandi skipan ógjørliga at liva við. Vit hava jú nærum allar teir fyrimunir, sum hugsast kunnu. Vit hava alt tað, eitt hvørt nýmótans, framkomið samfelag hevur, umframt alt tað, nógv onnur kundu hugsað sær.

- Vit hava okkara egna løggevandi vald (Løgtingið)
- Vit hava okkara egnu stjørn (Landsstýrið)
- Vit hava okkara egna stjørnarleiðara (Løgmann)
- Vit hava okkara egna mál (Føroyskt)
- Vit hava okkara egna flagg (Merkið)
- Vit skipa okkara egna lógarpolitikk
- Vit skipa okkara egna vinnupolitikk
- Vit skipa okkara egna umhvørvispolitikk
- Vit skipa okkara egna mentunarpolitikk
- Vit skipa okkara egna almennapolitikk
- Vit skipa okkara egna útbúgvingarpolitikk
- Vit ráða yvir øllum tilfeingið í havinum uttan um okkum
- Vit ráða sjálvir fyri hvussu tað verður gagnnýtt
- Vit ráða sjálvir yvir øllum inntøkum
- Vit skipa sjálvir fyri eftirliti og trygd
- Vit samráðast við onnur lond um loyvi til at gagnnýta part av teirra tilfeingi
- Vit samráðast við onnur lond um marknaásetingar
- Vit samráðast við onnur lond um handilsavtalur
- Vit ráða yvir øllum tilfeingi í undirgrundini
- Vit løggeva um ræðisrættindini av tilfeingi í undirgrundini
- Vit gera avtalur um gagnnýtslu av tilfeinginum í undirgrundini
- Vit skipa sjálvir øll umhvørvis- og trygdarkrøv
- Vit ráða sjálvir yvir møguligum oljuinntøkum
- Vit eru longu í neyvum samstarvi við annað land (Danmark)
- Vit avgera sjálvi í hvønn mun hetta samstarv virkar (Okkum til besta)
- Vit kunnu til eina og hvørja tíð gerast ES borgarar, uttan at vera limir.
- Vit kunnu til eina og hvørja tí og á einum og hvørjum stað kalla okkum Føroyingar
- Vit eru málsliga betri fyri enn flestu fólk í heiminum.
- Vit eru ein tjóð, og vit eiga eitt land.

Tað einasta, sum er til hindurs fyri at reksa alt fleiri fyrimunir er hugflog og plásstrot. Tað skal einans polittiskt hugflog til at gera hesa framúr støðu uppaftur betri. Hinvegin skal einans tvørrandi polittiskt hugflog til at gera støðuna verri. Tað er júst hetta, vit hava upplivað seinastu trý árini. Alt tað álit millum okkum og danir, sum tað hevur tikið skilamonnum øldir at byggja upp og betra hevur hendan samgongan megna at nærmast avhøvdað.

Kann milliardin gagna (blokkstuðulin ) samfelagið okkara?

Tann spurningurin kann svarast við nøkrum spurningum - og tað kundu saktans verið fleiri:

- Eru umstøðurnar hjá okkara gomlu optimalar?
- Eru pensjónsviðurskiftini í lagi?
- Eru sjúkrahúsvirðurskiftini í lagi?
- Eru ansingarviðurskiftini í lagi?
- Er samferðslukervið nóg nógv útbygt?
- Eru samferðslutólini tillagað nútíðarkrøvum?
- Kunnu vit verða nøgd við ikki at geva alla frálæru í Føroyum?
- Er tað í lagi, at vit ikki megna at menna og stuðla føroyskari mentan?
- Er tað í lagi, at onki granskingarumhvørvi finnst í Føroyum?
- Er tað í lagi, at fólkið knógvar undir skattabyrðum?
- Er tað í lagi, at høvuðsvinnutólið er gamalt og niðurslitið?
- Er tað í lagi, at sjóvegissambandið við umheimin er ein útflutningstrupulleiki?
- Er tað í lagi, at vit framvegis ikki hava møguleika fyri farmaflutningi loftvegis?

Jú, so sanniliga kann ein milliard brúkast við skynsemi og samstundis tæna landi og fólki.

Sambandsflokkurin vil verja og tryggja vælferðarsamfelag í tøttum samstarvið við hinar báðar partarnir av ríkisfelagsskapinum .

Val tykkara tann 20. novembur er sera umráðandi fyri framtíð okkara.

Sambandsflokkurin vil áhaldandi tosað søk Føroya fólks á fólkatingi, tí er júst tín stemma umráðandi fyri okkum.

Vel SAMBANDSFLOKKIN tann 20. november.

# Vit kunnu ikki góðtaka at deyðasjúk og avlamin verða send heim, tí sjúkrahúsdeildir verða stongdar

**Malan Helgadóttir**
*fólkatingsvalevni fyri Javnaðarflokkin*



Undir tí politiska orðaskiftinum í útvarpinum sunnukvøldið t.11. í hesum er tað orðaskiftið ímillum Vilhelm Johannesen og Sámal Petur í Grund, sum eg havi hug at gera eina viðmerking til.

Vilhelm Johannesen spurdi hvussu tað ber til, at deildir á Landssjúkrahúsinum ár undan ári verða stongdar í nakrar mánar hvørt ár.

Sámal Petur í Grund svaraði, at tað ikki er grundað á sparingar, men at soleiðis velur leiðslan á sjúkrahúsinum at leggja arbeiði til rættis, og tað fór hann sum landsstýrismaður ikki at blanda seg uppí.

Eg havi bara hug at fortelja Sámal Peturi, at tá sjúkrahúsið stongir deildir, verða fleiri av sjúklingunum skrivaði út til Heimaróktina at taka sær av, og eru hesir sjúklingar ofta sera røktarkrevjandi.

Hesi seinastu árini og serliga síðsta summar, hevur Heimarøktin ikki havt orku til at veita brúkarum í skipanini reingerð. Og nógv hevur verði tosað og skrivað um hetta óskil.

Hesi seinastu árini og serliga hetta seinasta árið er bíðitíðin eftir hjálpitólum frá Hjálpartólamiðstøðini longd við mánaðum. Og er eisini nógv tosað og skrivað um hetta óskil.

Eg spyrji bara, hvussu landstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum kann lata vera við blanda seg uppí, tá sjúkrahúsleiðslan velur at steingja deildir, sum ikki eru grundaðar á sparingar, og senda deyðasjúk ella avlamin fólk heim, sum bæði hava tørv á hjálpitólum, sum ikki er til at fáa fatur á, og hava tørv á sera nógvari røkt.

Eitt vita vit, at tað verða ikki tey sjúku og teirra avvarðandi, sum hava orku til at gera vart við støðuna, men hava kanska bert orku til at konstantera, at soleiðis er støðan.

Hvussu leingi skulu vit í Føroyum akseptera, at okkara veiku og sjúku vera viðgjørd á ein so mannminkandi hátt, tá tað ikki eru pengar sum mangla í hesum landið?

# Sambandsflokkurin hevur nýskipanaruppskot!

**Jákup Lamhauge**
*Valevni Sambandsfloksins*



Aftaná seinasta løgtingsval fingu føroyingar hina so væl kendu fullveldissamgonguna millum Fólkaflokkin, Tjóðveldisflokkin og Sjálvstýrisflokkin.

Hesir flokkar hava brúkt alla sína orku og tíð uppá fullveldismálið, meðan flest øll onnur átrokandi mál í samfelagnum eru løgd til síðir – ja beinleiðis eru niðurfyrst. Málið hevur verið og framvegis er føroyskt fullveldi – kosta hvat kosta vil.

**Danmarkarferðir samgongunar**

Allir føroyingar kenna mongu Danmarkarferðir samgongunnar og tey úrslit sum samgongan hevur fingið burtur úr stríðnum um føroyskt fullveldi – nevniliga at teir eru afturkomnir sum av torvheiðum – onki fet á sjálvstýrisleið – tíbetur, halda flestu føroyingar sambært meiningakanningarnar sum verið hava.

**Sambandsflokkurin tilreiðar at koma til hjálpar**

Sambandsflokkurin, sum hesi árini hevur verið í andstøðu, hevur staðiliga ávara ímóti fullveldisætlanini hjá samgonguni, tí flokkurin er fullvísur í, at um ætlan samgongunnar verður veruleiki, so verður tað til óbótaligan skaða fyri føroyska samfelagið.

Sambandsflokkurin heldur fast við støðu sína um, at limaskapur okkara í danska ríkinum hevur verið til almikið gagn fyri føroya fólk og vil flokkurin tí gera alt fyri at ríkisfelagsskapurin verður varðveittur.

Sum eitt alternativ til politikkin hjá fullveldissamgonguni hevur Sambandsflokkurin tí tilevnað eitt nýskipanaruppskot sum m.a. hevur hesi punkt:

At heimastýrisskipanin skal endurnýggjast.
At ríkisrættarligu viðurskiftini skulu geriðast, har tey eru ógreið.
At ríkisfelagsskapurin skal varðveitast.
At Føroyar skulu hava felags grundlóg og kongshús við Danmark.
At føroyingar skulu hava somu ríkisborgararættindi sum danir.
At Føroyar skulu hava umboð á Fólkatingi.
At gjaldoyraveiðurskifti, verju- og uttanríkismál skulu vera ríkismál.
At rættarskipanin í høvuðsheitum skal varðveitast.
At øll mál – uttan felags mál fyri ríkisfelagsskapin – skulu kunna yvirtakast.
At Føroyar sjálvar gjalda fyri allar yvirtøkur.

Við hesum heldur Sambandsflokkurin, at Føroyar gerast alt meira sjálvbjargnar, at vælferðarsamfelagið mennist og varðveitist, og at komandi ættarliðum gevast fjølbroyttir møguleikar í altjóða høpi.

Á fólkatingsvalinum hava føroyingar so møguleikan at velja millum politikkin hjá fullveldissamgonguni ella politikkin hjá Sambandsflokkinum.

Ætla tygum at varðveita Føroyar sum eitt trygt samfelag at búgva í, so eiga tygum at taka undir við Sambandsflokkinum.